

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 12 - 2012

# Uppaftur størri oljuíløgur í Norra

Roknað verður við, at feløgini fara at gera íløgur fyri 208 milliardir krónur í norsku oljuvinnuni næsta ár. Tað er knappar fýra milliardir krónur meiri enn fyrr mett. Íløgurnar til leiðir, sum eru í rakstri, verða ætlandi 103 milliardir krónur í 2013, og tað er góðar seks milliardir meiri enn tann tilsvarandi metingin fyri árið í ár. Roknað verður við, at feløgini fara at brúka knappar 64 milliardir krónur til at útbygging, og tað er heilar 13 milliardir meiri, enn feløgini verða mett at hava brúkt til útbyggingar í ár. Loksins verður mett, at feløgini fara at gera íløgur í leiting næsta ár fyri 37 milliardir krónur. Tað er heldur minni enn tann upprunaliga metingin, men kortini næstan fimm milliardir meiri enn í ár. Ein uppgerð yvir íløgurnar í fjórða ársfjórðingi bendir á, at oljufeløgini hava gjørt íløgur fyri 180,6 milliardir krónur í norskum øki í ár. Tað er 4,3 milliardir minni enn í seinastu samanteljing, men samstundis 28 milliardir meiri enn í teirri tilsvarandi uppgerðini í fjør.